# handVERKARIN

3. ÁRSFJÓRÐINGUR 2007 BLAÐ NR. 24 HAVNAR HANDVERKARAFELAG



# 3-ára sáttmáli við Meistarafelagið

**10. oktober í ár varð trý ára sáttmáli undirskrivaður við Meistarafelagið. Sáttmálin er galdandi frá 1. oktober í ár, tá tímalønin fór úr 113,69 kr. upp í 115,94 kr. 1. oktober 2009 verður tímalønin hjá handverkarum 120,45 kr. og eftirlønin 15%**

## Setanarskriv og bólkar

Umframt reglurnar, sum higartil hava verið galdandi fyri setanarskriv, er nú hetta lagt afturat:

Handverkari verður settur í starv við skrivi í ein av hesum trimum møguleikum:

A) Handverkari við føstum arbeiðsstaði.
B) Handverkari við skiftandi føstum arbeiðsstaði.
C) Handverkari, sum veitir kundum tænastur / servicefólk.

Um setanarskriv er hetta eisini galdandi: Tann sum verður settur í starv og setanin varar longri enn 3 mánaðir, og arbeiðstíðin er í miðal meira enn 8 tímar um vikuna, skal hava setanarskriv, har upplýst skal vera: Navn arb.gevarans, dagur fyri starvssetan, starvstað, starvsøki, starvsaldur, galdandi sáttmáli, møguligar aðrar avtalur í sambandi við starvsetanina.

## A, B ella C starv

Handverkari settur eftir A er størsta partin av tíðini á einum arbeiðsstaði.

Arbeiðsplássið er skrásett adressa hjá fyritøkuni.

Handverkari settur eftir B arbeiðir t.d. í byggivinnuni, og hevur tí byggiplássið sum fast arbeiðsstað í eina ávísa tíð.

Handverkari settur eftir C veitir skiftandi kundum tænastur og koyrir regluliga út at loysa uppgávur á staðnum – vanliga kalla servicefólk, ið sostatt ikki hava fast arbeiðsstað.

Tá fólk verða sett við seturnarskrivi í bólk C, skal serlig avtala gerast millum arbeiðsgevara og servicefólk um arbeiðsumstøðurnar.

## Sveinaløn og eftirløn

1. oktober 2008 hækkar tímalønin við 2,35 kr.
1. oktober 2009 hækkar tímalønin við 2,45 kr.
Eftirlønin hækkar 1. oktober 2008 við 1%.

**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag · Sjúrðargøta 20 · Box 203 · 110 Tórshavn
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík
**Blaðstjórn:** Snæbjørn í Dali · **Umbróting og prent:** Pf. Einars Prent
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
**Avgreiðsla:** Yrkadagar frá kl. 9 til 12 · Hósdag er eisini avgreiðsla frá kl. 15 til 18.
Tel. 35 48 00 · Fax: 35 48 01 · Teldupostur: handverk@handverk.fo. · www.handverk.fo

Eftirlønin hækkar 1. oktober 2009 við 1%.

Sveinalønin fór 1. oktober 2007 upp í 115,94 kr. Samstundis fór eftirlønargjald arbeiðsgevarans úr 10% upp í 11% Løntakaraparturin til eftirløn er óbroyttur 2%. Sostatt er eftirlønargjaldið hjá sveinum í løtuni tilsamans 13%.

Fyri lærlingar fór eftirlønarpartur arbeiðsgevarans 1. oktober úr 4,5% upp í 5,5%.

Tá handverkari er fyltur 67, verður lønarkvotienturin svarandi til eftirlønargjaldið útgoldin sum løn.

## Lønar- og vikuseðlar

Sambært § 21. í sáttmálanum skal meistarin gjalda øll gjøld, sum eru nevnd í sáttmálanum, saman við lønarflyting. **Lønar-/vikuseðlar skulu fylgja við.**

## Sáttmálatengd gjøld

Øll sáttmálatengd gjøld (eftirløn, Bati, Vitin) verða framd samstundis sum lønarflyting. Hetta merkir, at sáttmálatengdu gjøldini skulu gjaldast samstundis sum lønin verður goldin.

Tá sáttmálatengdu gjøldini verða avgreidd, skal uppgerð/yvirlit, sum vísur hvønn goldið verður fyri, sendast til móttakaran.

Uppgerð fyri eftirlønargjøld skal sendast til Havnar Handverkarafelag.

Hetta er eisini eitt krav frá Tryggingareftirlinum til Eftirlønargrunn Havnar Handverkarafelags.

Uppgerðin skal vísa hvønn goldið verður fyri og hvussu nógv verður goldið fyri hvønn einstakan (løntakara- og arb.gevarapartur)

Um bert eitt fólk er í starvi, er ikki neyðugt at senda uppgerð, men skal tá navn, limanr. og p-tal, umframt løntakara- og arbeiðsgevarapartur (%) viðmerkjast, tá goldið verður.

## Limagjald

Sveinar, ið eru limir í Havnar Handverkarafelag rinda sjálvir limagjald.

Undantøk eru tó hjá summum mánaðarløntum sveinum, har avtala er gjørd við arbeiðsgevara um at taka limagjaldið av lønini og gjalda til okkara.

## Lærlingar og limagjald

Lærlingar rinda 10,- kr. hvørja viku í limagjaldi til Lærlingafelag Havnar Handverkarafelags.

Arbeiðsgevarin eftirheldur 10,- kr. hvørja viku til limagjald, sum skal rindast Havnar Handverkarafelag. Arbeiðsgevarin sendur eisini inn uppgerð, sum vísur hvønn goldið er fyri og hvussu nógv er goldið.

*… framhald á síðu 27*

## Innihaldsyvirlit:

| | síða |
|---|---|
| 3-ára sáttmáli við Meistarafelagið | 2 |
| Bestur í kongaríkinum | 4-5 |
| Føroyskt handverk í søguni | 20 |

## Eivind av Reyni, stjóri, um Jóannes í Dímun Jacobsen:

At Jóannes gekk uppí útsjónd og litir sást skjótt aftur á hansara egna kroppi, man mátti viðhvørt hyggja tvær ferðir um tað nú var Jóannes ella ein nýggjur meðarbeiðari, sum var komin í praktikk ella í læru.

Hetta sigur eitt sindur um hansara kreativu og serligu evnir; tað vísti seg skjótt, at tað vóru bæði hendur og hugflog, sum virkaðu saman í eini hægri eind, tá ið onkur serlig uppgáva skuldi loysast.

Tað hevur verið ein fragd at hava Jóannes í læru, og at hann valgdi júst hetta yrki var óiva ein røtt avgerð fyri hansara viðkomandi.

Vit eru fegin um, at Jóannes hevur ynskt at halda fram sum "bilmálari" hjá okkum, tá ið hugsað verður um hansara dygdir, saman við einum prógvi, sum talar fyri seg.



*Eivind av Reyni handaði Jóannesi gávu fyri góða avrikið.*



**Eyðstein Jacobsen, lærumeistari, um Jóannes:**

Lat meg fyrsta nevna, at eg havi kent Jóannes síðan han var smádrongur, og eg legði skjótt til merkist, at hann dámdi óvanliga væl at tekna, eg helt eisini, at hann dugdi óvanliga væl at tekna.

Í heila tikið má man siga, at Jóannes hevur serliga góð kreativ evnir. Men tað hevur hann ikki frá ongum, tað hava mamman og pápin eisini. Skal eg siga nakað um, hvussu hann er at arbeiða saman við, so vil eg siga, at hann er altíð nærlagdur og arbeiðssamur.



**Magnus Pauli Udbø, lærumeistari, um Jóannes:**

Jóannes er dugnaligur og álítandi; alt sum hann ger, er væl úr hondum greitt, hansara lutur liggur ongantíð eftir. Og eg havi aldrin hoyrt eitt øvugt orð frá honum.

Nú er Jóannes fastur partur av lakktoyminum hjá Reyni Service, tað gleðir okkum.

Lat meg skoyta uppí, at er tað nakar, sum hevur uppiborið eina silvurmedalju, so er tað Jóannes.

*Jóannes í Dímun Jacobsen:*

# Bestur í kongaríkinum

**Tá vit hitta Jóannes spyrja vit sjálvandi fyrst, hvussu hann hevur borið seg at, nú hann hevur fingið skotsmálið „Besti lakklærlingurin í kongaríkinum seinastu 12 árini“.**



Tað er ein longri søga svarar Jóannes við einum skálkabrosi.

Tá eg gekk í 9. flokki í Eysturskúlanum var eg í praktikk hjá Reyni Service. Tað var í 2002, og mær dámdi ordiliga væl. Frammanundan hevði eg verið í praktikk hjá einum arkitekti, men tað var ikki ordiliga eg.

## Varð spurdur og tók av

Eg minnis væl, at ein dagin eg var hjá Reyni Service, tá spurdu Eyðstein Jacobsen og Magnus Pauli Udbø um eg ikki hevði hug at koma í læru sum bilmálari hjá Reyni Service. Eg tók teir uppá orðið, og teir hava eisini verið lærumeistarar hjá mær.

Eg byrjaði at læra 10. mars 2004 og varð útlærdur 9. sept. í ár. Tíðin hevur gingið skjótt, og tá plagar man at siga, at man hevur havt tað gott. Tað haldi eg, at eg eisini kann skriva undir uppá.

*Bilurin hjá Jóannesi í Dímun Jacobsen, sum hann alt fyri eitt sproytaði, tá hann keypti hann nýggjan.*



## Hvat er tað sum dregur

Tá vit spyrja Jóannes, um tað er okkurt honum dámar serliga væl at gera er hann skjótur at svara, at tað er onki at ivast í, – mær dámar ótrúliga væl, at gera og sproyta mynstur á t.d. skermar og motor-hjálmar.

Tað er tað vit kalla staffering; tað er altíð ein spennandi avbjóðing, sum mær dámar ótrúliga væl.

Mynstrini geri eg við „Fitline tape“, tað er eitt slag av klistribandi (tape) sum er gjørt til endamálið. Tað er bleytt og elastiskt; 6 mm breitt. Tað er lætt at forma við fingrunum, men tað krevur eisini eygamát.

## Teknar við telduni

Men áðrenn man kemur so langt er nógv annað at gera. Vanliga geri eg tær fyrstu tekningarnar við telduni. Tá brúki eg Photo Shop; tað er eitt grafikk-forrit, sum mær dámar sera væl at arbeiða við.

Tá tekni eg detaljurnar, sum skulu vera í mynstrinum, og finni teir røttu litirnar. Tá tað er komið uppá pláss havi eg eina fyrimynd at arbeiða víðari við. Tað endaliga úrslitið er sjálvandi nógv størri enn tekningin, sum eg geri við telduni. Tá ræður - mest av øllum - um at hava gott eygamát.

## Uttanfyri landoddarnar

Jóannes greiðir frá, at hjá honum er tað umráðandi at fylgja væl við, hvat hendir uttanfyri landoddarnar. Og í hesum sambandi er internetið eitt „must“. Tað eru fleiri heimasíður, sum geva mær góð hugskot. Fyrst havi eg hug at nevna Pimp My Ride, tað er ein heimasíða hjá MTV; hon er á http://www.mtv.com/ontv/dyn/pimp_my_ride/ series.jhtml

## Orange County Choppers

Og so er tað OCC, tað er ein stytting av „Orange County Choppers“. Hon er á http://www.orangecountychoppers.com

OCC handlar mest um motorsúkklur, men tað, sum er serliga áhugavert er, at hon er avmarkað til hondgjørdar motor-súklur. So man kann siga, at tað snýr seg um „regulert“ handverk, – alt verður gjørt við hond. Eg haldi tað vera áhugavert og stuttligt t.d. at síggja ein hond-gjørdan besintanga; tað hugtekur meg, tá man hugsar um, at eingin maskina hevur verið uppi í leikinum. Hann er



*Jóannes og unnustan Olga Maria Mortensen.*

gjørdur úr einari reinari metallplátu. Tá er oftast talan um ein handverkara, sum liggur langt omanfyri tað vanliga.

## www.Myspace.com

Eg eri eisini ofta á Myspace, www. Myspace.com. Har havi eg mína egnu síðu við myndum av t.d. mínum núverandi og fyrrverandi bilum.

Myspace hevur fingið eina ótrúliga stóra og góða undirtøku, har hittast ungfólk úr øllum heiminum. Man kann eisini siga, at har eru øll í somu stovu ella á sama báti. Har hittast ung úr so at siga øllum heimsins londum.

Á MySpace er lætt at koma í samband við fólk, sum hava somu áhugamál sum tú. Har møtir man fólki, sum man annars ikki kom í samband við. Man kann siga, at MySpace er eitt umhvørvi, sum skapar samband millum fólk, men hetta sambandið er oftast avmarkað til MySpace. Tað er eitt heilt annað slag av sambandi enn tað, sum annars er vanligt. Har hittir man eisini føroyingar, sum man annars onki veit um.

Eg má eisini nevna Discovery, har er ein sendirøð um gamlar bilar, sum eg plagi at hyggja eftir. Tað eru gamlir útslitnir bilar, sum verða afturgjørdir, so teir vera sum nýggir; – tað er áhugavert og hugtakandi at síggja.




*Hetta er ein Suzuki Swift 1.5 VVT 2005, sum Jóannes hevur átt og prýtt. Hetta er ein bilur, sum sæst væl í býarmyndini.*

… framhald á síðu 9



# TEKNISKI SKÚLIN

TÓRSHAVN



- ✓ *Handverksútbúgvingar*
- ✓ *Støðisútbúgving*
- ✓ *Yrkisakademiútbúgvingar*
- ✓ *Skúlaheim*

*Marknagilsvegur 75 • Postboks 3239 • 110 Tórshavn • telefon 308050 • telafax 308051*

*www.tst.fo • tst@tst.fo*





# Lyklaklár fígging og trygging til bilin

Ætlar tú at keypa bil, bjóða vit tær fígging og trygging um eina leið. Tú fert beint inn á bila søluna, har tú fært landsins bíligastu og skjótastu fígging beinanvegin. Í somu vending avgreiða vit tryggingina. Tú fært lykilin og koyrir avstað.

Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn,
Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

*- so ert tú tryggari*

www.sansir.fo

*… framhald frá síðu 7*

## Tekniski skúlin í Silkeborg

Eg havi verið 4 skúlaskeið í Danmark; á tekniska skúlanum í Silkeborg.

Fyrsta skúlaskeiðið var frá 11. oktober til 21. desember 2004.

Longu tá lærdi eg nógv, tað var spennandi. Eg minnist, at á fyrsta skeiðnum fingu vit ein Morris Mini skerm at arbeiða við.

Á skúlanum arbeiddu vit nógv við Morris Mini bilum. Teir hava so rundar formar og eru tí ikki so lættir at arbeiða við, sum bilar sum ikki hava rundar formar. Tað gevur størri avbjóðingar og man lærur meira.

Tá eg so kom aftur á verkstaðið kundi eg átaka mær størri uppgávur, tá hevði eg fingið nógv grundleggjandi ting uppá pláss.

Eitt ár seinni var eg aftur í skúla í Silkeborg, tað var 10 vikur.






Eg minnist, at tá skuldu vit gera eina stafferering á eina Opel Kadett hurð. Tað var fyrstu ferð eg royndi tað.

Triðja skúlaskeiðið var um várið 2006, tað var eisini 10 vikur. Tá gjørdu vit m.a. ein motorhjálm á einari "Boblu" - ein gamal VW fólkavognur. Tá skuldu vit eisini sproyta eina stálfelgu; tað var ein góð avjóðing, har eru nógvir kantar, sum krevja sítt.

Seinasta skúlaskeiðið byrjaði 30. juni í ár, tað var 4 vikur, og seinasta vikan í juli var so sett av til sveinastykkið.

## Sveinastykkið

Jóannes gjørdi sveinastykkið á Tekniska skúlanum í Silkeborg seinastu vikuna í juli mánað í ár. Har vóru 17, sum gjørdu sveinastykki samstundis. Teir fingu allir somu uppgávu, sum var at klárgera og sproyta gronina á einum Toyota Yaris.

Jóannes greiðir frá, at teir skuldu spartla, slípa, klárgera og lakera motor-

*… framhald á síðu 12*


Ein góð byrjan
Er grundarlagið í lagi? Timburhandilin og 2x3 ynskja at bjóða tær eina góða byrjan við einum breiðum og góðum úrvali av Mascot arbeiðsklæðum og DeWALT amboðum.
TIMBUR HT TILFAR HANDILIN


Nýtið bara bestu útgerð umborð á føroyskum fiskiførum
VARTA
Battariir Til Øll Endamál
Fartelifonir
Hoyri Apparatir
Ur og mangt annað
Eisini hava vit øll vanlig battariir
Heil- og smásøla, landsins bestu battariir, og landsins bestu prísir
PÓLAR

# Netbóking

**keyp tína ferð tá tað passar tær...**



www.sansir.fo

Tað er lætt at keypa ferðaseðlar frá Atlantic Airways.
Far inn á atlantic.fo og bílegg tín ferðaseðil.
Tað einasta, tær nýtist, er eitt gjaldkort.

Gjaldkort, sum kunnu nýtast: Dankort/VISA, VISA, MasterCard, Diners Club.

ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum

www.atlantic.fo



Arbeiðsgongd: Mynd 1



Arbeiðsgongd: Mynd 2



Arbeiðsgongd: Mynd 3

*… framhald frá síðu 9*

hjálm, forskermar og kúfangara.

Man hevur ikki loyvi til at rætta buglur, tær skulu spartlast. Aftaná skuldu vit so til eina teoretiska roynd.

## Besta karakterin

Úrslitið hjá Jóannes kundi ikki vera betur; hann fekk karakterin 12. Tað er tann besti kartakterurin, sum er givin á skúlanum í hesum fakinum seinastu 12 árini.

Á skúlanum brúka tey ikki 13-skalan. Tey brúka ein nýggjan skala, sum nú er galdandi í øllum ES-londunum. Har er 12 tað sama sum 11 og 13 var fyrr.

Karakterirnir í nýggja skalanum eru hesir:

Fyrr: 11-13 er nú 12
Fyrr: 10 er nú 10
Fyrr: 8-9 er nú 7
Fyrr: 7 er nú 4
Fyrr: 6 er nú 2
Fyrr: 05-03 er nú 0
Fyrr: 00 er nú minus 2

## Billakk

Tá tað kemur til lakk haldi eg ikki man kann siga, at eitt ávíst slag av lakki er best og eitt annað vánaligast.

Vit kunnu heldur tosa um tvey sløg av lakki; tað sum fólk vanliga kalla metall-lakk og so unilakk.

Tá vit tosa um metall-lakk er talan um tvey løg; fyrst eitt við liti, og so eitt lag av klárlakki omaná. Tað heldur betur upprunalitin og skøvast ikki so lætt.

Liturin í unilakki verður nógv skjótari niðurslitin av sólarljósi, og tað verður tí eisini rættuliga skjótt matt.

## Diamant klárlakk

Men tað eru ikki øll lakk, sum eru líka hørð. Á mínum bili, tað er ein Honda Civic 1.8 i-Vtec 2006, havi eg diamant klárlakk.

Tað er nógv harðari enn vanligt lakk og tí skøvast tað ikki so lætt. Her kann eg skoyta uppí, at allir Lexus bilar hava diamantklárlakk.

Eg havi roynt nógv ymisk sløg av lakki, men vendi altíð aftur til eitt slag, sum eitur Spies Hecker.

Summi lakk torna skjótari enn onnur, tað kann eisini hava týdning, tá man velur lakk.

## Vandar eru eisini

Vit mugu ikki gloyma, at billakk, eins og annað lakk, er ein vandamikil kemisk samanseting, greiðir Jóannes frá. Tí er umráðandi altíð at halda seg til ávísar mannagondir, og brúka tey amboð, útgerð og verju, sum eru gjørd til slíkt arbeiði, serliga handskar, masku og

… framhald á síðu 16



*Arbeiðsgongd: Mynd 4*



*Arbeiðsgongd: Mynd 5*



*Arbeiðsgongd: Bilurin er liðugur.*

HÚSASMÍÐ
Finnur Simonsen
tel. 31 45 49 - 51 45 49 - fax 31 83 81

Málarameistararnir
FALKENBERG
Tlf. 21 31 51 Tommy
Tlf. 21 31 54 Benny



SKIPASMIÐJAN
www.faroeyard.fo




## Lat heldur okkum gera tað...

Húsavarðartænastan er altíð klár. Vit gera tímasáttmálar ella heildarloysnir til virkir og stovnar, har vit altíð eru til reiðar at gera umvælingar ella aðrar uppgávur – alt samdøgrið.

**...húsavarðaarbeiði**
**...alt snikkara- og timburarbeiði**
**...umvælingar**
**...sethúsabygging**

Tel 565589 - 565590
hvt@kallnet.fo, Fax 315590

**Húsavarðartænastan**

**Ognað tær tín egna húsavørð**

Vit veita ráðgeving í tryggum og hugnaligum umhvørvi

SUÐUROYAR SPARIKASSI
*www.sparsu.fo, Tel 35 98 70*





*Jóannes er altíð væl ílatin, tá ið hann arbeiðir.*

… framhald frá síðu 13

sproytudrakt. Man kann siga, at tað er umráðandi altíð at vera rætt ílatin, tá man arbeiðir við billakki.

## Føroyska veðurlagið

Tá vit spyrja Jóannes um man kann siga, at eitt ávíst bilmerki klárar seg best í føroyska veðurlagnum, sigur hann, at fyri tað fyrsta kann man tosa um ymiskar prísklassar, og so kundi man sagt, at tann dýrasti bilurin hevur longst livitíð, men so lætt er tað neyvan.

Men vit sleppa kortini ikki undan at siga, at prísurin ofta er eitt signal um góðsku. Eg haldi ikki, at eg fari at nevna eitt ávíst bilmerki, men havi heldur hug at siga, at ofta hoyrir man, at týskir bilar klára seg væl í føroyska veðurlagnum, og teir hava tí eisini eitt høgt brúktbilavirði.

Men vit mugu ikki gloyma, at bilar rusta nógv meira í Føroyum enn í mongum øðrum londum. Tað er onki at ivast í.

Nærri sannleikanum koma vit neyvan.

## Motorgóðska

Tá prátið fellur á bilmotorar greiðir Jóannes frá, at tað sjálvandi er munur á, hvussu sterkir bilmotorar eru. Sum dømi nevnir hann, at stórur munur er á, hvussu langt motorar t.d. klára at koyra við ov lítlari olju; bilmerkini eru sera ymisk á hesum øki.

Nøkur tola minni og onnur meira. Í hesum sambandi nevnir Jóannes, at Toyota hevur ein av teimum slitsterkastu motorunum í heiminum. Motorarnir í toyotabilum koyra óvanliga leingi uttan trupulleikar, hóast teir ikki verða væl røktir. Tað sigur eitt sindur um motorgóðsku, leggur hann afturat.



*Ein Honda Civic 1.5 Vtec 1990, sum Jóannes hevur prýtt.*

## Ensk frágreiðing

At enda kunnu vit nevna, at sveinabrævið hjá Jóannes er rættuliga internationalt. Á sveinabrævinum er ein frágreiðing um útbúgvingina hjá honum á enskum. Har stendur soleiðis: „The Chairman og the Vocational Joint Committe for the Trade Painting herby certify that the journeyman mentioned overleaf has gone througt and passed the training approved by the Trade og Painting and the Ministry of Education, and passed a vocational according to rules in force."

Á www. cirius online.dk eru nágreiniligar frágreiðingar á enskum, týskum og fronskum um útbúgvingina.

## Jóannes hevur átt hesar bilar:

Toyota Corolla 1.6 XL 1988
Honda Civic 1.5 Vtec 1996
Suzuki Swift 1.5 VVT 2005

Í løtuni hevur Jóannes ein Honda Civic 1.8 i-Vtec 2006



***Sveinastykkið hjá Jóannesi síggja vit her fremst á myndini.***



Jógvan Weihe

Vit seta krøv til dygdina

trygdarhjálmar

trygdarskógvar

og tey røttu klæðini

p/f Jógvan Weihe - Stiðjagøta 10 - tel. 35 38 97 - www.jogvan-weihe.fo





TÁ ALT SKAL PASSA SAMAN

HEILDARVEITING INNAN EL-INNLEGGING, RÁÐGEVING OG PROJEKTERING

- El-innleggingar
- Ljós og talvur
- EDV- & telefonnet
- Neyðstreymur til X-felt og teldur (No-break og diesel)
- Køling av X-feltum og teldurúmum (air condition og køliskipanir)
- Trygging av X-feltum og teldurúmum (atgongueftirlit, innbrotsávaring, eldávaring og eldsløkking)

SISERO 351800

ELECTRIC

Hoyvíksvegur 53 • 100 Tórshavn • Tel 35 12 20 • Fax 35 12 30 • lm@lm.fo • www.lm.fo

SAMDØGURTÆNASTAN SVARAR ALTÍÐ Á TEL 35 12 20





# AGA Føroyar - Føroya Gassøla

- **Ídnaðargass:** Skeri- og sveisiamboð
- **Húsarhaldsgass:** Gassapparat, komfýrar, hitaovnar, gassgrýtur
- **Campinggass:** Kókibluss, hitaovnar
- **Gassbrennarar:** Til sveising av takpappi, lodding, svíðing
- **ESAB:** Elektrodir og sveisiútgerð

*- vit hava sølustøð kring landið*

Akranesgøta 2 · Postrúm 1088 · FO-110 Tórshavn
tel 315544 · fax 311706
e-mail: gassola@post.olivant.fo

# Foroyskt handverk í søguni

**Fara vit nakað aftur í tíðina so gjørdu føroyingar sjálvir so at siga øll amboð, lutir og klæðir, sum kravdust til gerandis og heilagt.**

Fyrst er at nevna, at tá lutir vóru virkaðir, varð ikki einans hugsað um eina praktiska loysn. Tað hevði eisini týdning, at tað, sum virkað varð, var vakurt. Og vit kunnu leggja afturat, at hetta varð gjørt, hóast gerandisdagurin var so strevin, sum vit í dag valla duga at meta um. Ongir hentleikar vóru, og mest sum alt arbeiði var tungt og drúgt. Tíðin var av somu orsøk eisini oftast knøpp.

## Vakurleikin hevði stóran týdning

At vakurleikin hevði týdning, undir hesum vána umstøðum prógva mangir av teimum gripum, amboðum, lutum og klæðum, sum eru varðveitt á Føroya Fornminnissavni.

Tað er ikki ov nógv sagt, at mangan er talan um meistaraligt handverk á sera høgum støði.

Men alt er ikki hvørsmans føri, og tí er onki at ivast í, at ein stórur partur av teimum gripum, sum eru varðveittir á Fornminnissavninum, eru tilevnaðir av fólki við stórum listarligum gávum.

## Listaverk

Her er hóskandi eisini at nevna gomlu føroysku trækirkjurnar, sum meira og minni eru prýddar við framúrskarandi træskurðum á høgum listarligum støði.

Og føroyski róðrarbáturin, sum í sjálvum sær er eitt satt listaverk, og samstundis sum róðrarbáturin er eitt listaverk, er hann eisini bátur, sum ikki kundi verið hóskiligari til føroyskar umstøður, – náttúru, veðurlag, streym og lendingarmøguleikarnar, sum føroyingar livdu undir í øldir. Og fyri ikki at tala um allar teir mongu lutir og amboð, sum føroyingar í øldir hava virkað t.d. úr horni, jarni og træi.

## Báturin

Um føroyska bátin skrivaði Karsten Hoydal í 1950: „Meðan nakrir bátasmiðir smíðaðu bátar, ið kendust tungir og dumbir, so vóru aðrir meira artistiskt gávaðir, ið megnaðu at geva bátinum ein slíkan lættleika í forminum, at hann kom at kennast sum livandi skulpturur. Tá ið bátarnir stóðu á rað í fjøruni ein summar dag, kundu teir minna um eina risa palett. Svart og skínandi hvítt, sterkt reyðir, bláir og grønir litir. Bátarnir kundu soleiðis bera boð um eina litgleði."

## Tjóðbúnin

Og tjóðbúnin, – til hann bundu og vóvu tey litrík klæði, gjørdu knappar, spenni og maljur. Alt hetta - taka vit í dag sum eina sjálvfylgju, men tað er

skapt og ment av undanfarnum ættarliðum í øldir við stórari virðing fyri vakurleikanum.

## Bóndasamfelagið

Í gamla bóndasamfelagnum var ikki húsa- og jarnsmiður í hvørjari bygd. Tað hevur verið rættuliga vanligt, at bóndin ella annar var jarnsmiður framíhjá, og smíðaði bæði amboð og amboðspartar, sum tørvur var á.

Dømi er um bónda, sum, áðrenn hann fór til dagsgerð sína, smíðaði allan tann bátaseym, sum bátasmiðurin skuldi nýta tann dagin.

Og her nema vit við kjarnan í tí gamla føroyska bygdafelagskapinum. Menn arbeiddu í felag, hvør hjálpti øðrum eftir førimuni, og menn skiftu arbeiðið sínámillum soleiðis, at hvør gjørdi tað, sum lá best fyri hjá honum.

## Samstarv

Skuldi bóndi t.d. hava haka, so dugdi hann kanska sjálvur at telgja hakafótin, men fekk jarnsmið at gera hakagrevið. Bóndin kundi so gera jarnsmiðinum einhvønn beina afturfyri.

Virkisøkið hjá jarnsmiðinum var ójavnt. Hjá teimum hegnigastu allar Føroyar; teir dugdu eisini handverk sítt til lítar: leggja í stál, og at herða tað í eggjørnum. Eisini gjørdu teir fjarðar á lásum og byrsum. Í sínum arbeiði hevði jarnsmiðurin nógv amboð, sum hann eisini sjálvur gjørdi: hamarar, tengur o.s.fr. ja enntá stiðan, sum alt var smíða á.

## Høvuðsamboðið var knívurin

Fram um alt smíðaði jarnsmiðurin knívar, sum var høvuðsamboð føroyinga, og sum hvør maður altíð hevði undir lið. Øll kenna vit orðatakið „knívleysur er lívleysur“. Tað sigur við 3 orðum nett og knívskarpt, hvussu neyðugur knívurin var í nærum øllum arbeiði. Og tað vóru ikki einans menn, sum altíð bóru knív, tað gjørdu flestu konur eisini.

Við knívinum ótu tey, svævdu seyð, stungu oksar, skóru hval á háls, flettu, skóru upp og limaðu sundur. Og væl bar til, tí øll høvdu frá barnsbeini lært at halda knívi og lært, hvar skuldi setast á.

Tó at onnur amboð eisini vórðu nýtt, so var knívurin álitið í so mongum arbeiði hjá træsmiðinum og smásmiðinum. Við knívinum hava summir fingið í lag at telgja skrúvur og skrúvugongd. Tað er heldur einki annað amboð, sum mannfólkini hava vandað sær so væl um, sum um knívin.

## Knívsblaðið

Blaðið á føroyskum knívum var øðrvísi sneitt enn á knívum, vit annars vita um í øðrum londum, og tað er neyvan tilvild, men úrslit av royndum.

Skaftið á knívum til gerandisbrúk var oftast av tilvildarviði, og slíðrarnir úr leðri ella úr viði við hornhólkum, færri og fleiri.

Á knívum, sum skuldu bjóða sær betur fram, vóru skøftini av mahogni og teak ella øðrum frægari viði.

Eisini hava teir havt serligar skartknívar, ið vórðu innlagdir við ljósari og myrkari viðasløgum, stundum við myndum úr metal, seinri fara teir at gera knívar og slíðrar úr ibenholt við innløgdum silvur- og beinamynstrum og myndum, ella gera teir úr hvalabeini við metalhólkum

*… framhald á síðu 24*

Ídnaðar- og garaguhurðar

Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92

Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður

Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn

Henning Sørensen

MÁLARAMEISTARI

TEL. 31 47 87 & 21 89 31





VINDEYGUNI SIGA ALT

**HDYGD umfatar ymsar vørur:**
- vindeygu
- altanhurðar
- úthurðar

**Úr ymsum tilfari:**
- træ
- træ/alu
- plast

**Við ymsum funktiónum:**
- toppsving
- síðusving
- síðuhongd
- topphongd

**Við 10 ára trygd:**
- døgg millum rútarnar
- rotskaðum (treytað av at vit mála liðugt)
- at viðurin skjýtur seg og fer sundur í lamineringini
- funktiónsfeilum á besløgum

HDYGD

Í Geilini 2 | FO-385 Vatnsoyrar | Tel.: +298 332177 | www.hdygd.fo | post@hdygd.fo

REPROZ

**rør-tænastan**

Vatn-Hiti-Sanitet-Ventilatión

*Eyðfinn Hansen*
*í Geilini 5*
*FO-175 Kirkjubøur*
*Faroe Islands*
*tel./fax: +298 32 81 80*
*fartel.: +298 22 81 80*
*e-mail: eydfinnh@post.olivant.fo*

**elmek**

**v/Magnus Magnussen · Gripsvegur 18 · FO-100 Tórshavn**
**tel 317352 · far 217700 · elmek@post.olivant.fo**

**Alt el- og edvarbeiði verður gjørt skjótt og væl**

**BAXI KETIL**



BALTIC CS
18-25Kw

Sera orkusparandi ketil frá BAXI.

CE góðkendir.
DS/ISO 9001 góðkendir.

Við kappa til oljufýr

Ein tann mest orkusparandi ketil á føroyska marknaðinum.

Síggj kanningina
á www.sparolie.dk

**Tórshavn:**
Stiðjagøta 2 - Postboks 378
tel 30 93 10 - fax 30 93 11

**Vágur:**
Á Marknoyri
tel 37 35 35 - fax 37 35 65



demich

… framhald frá síðu 21

## Fjallstavurin

Eitt annað amboð, sum menn altíð hava havt fragd av at fríðka um, er fjallstavurin.

Niðast hevur hann langan jarnpík, ofta við hegnisliga smíðaðum veðrum, sum vóru til gagns og prýðis. Við ovara enda er altíð eitthvørt serligt gjørt. Hann kann enda í knøtti, er oftast skreytskorin við krot- ella myndaskurði, ella við svidnum myndum.

Serligan ómak gjørdu summir sær við fríggjarastavinum, sum skuldi vera so langur, at maður røkk at leggja fingrarnar á toppin, tá píkin stóð á fótablaðnum.

## Krotskurður

Krotskurður er annars serliga á størri og smærri kistlum, ið ofta eru bæði snøgt og stuttliga gjørdir. Við hvørt eru teir úr einum kubba. Næstan allir kistlar eru at læsa, summir við kynstrigum lásum, naddalásum, finnalásum ella nýralásum, ið ein og hvør ikki fekk upp.

Ískornar eru eisini flestar manglifjalirnar, festargávur frá dreingi til gentu; á teimum síggja vit hendinga ferðir blaðskurðverk. Og handfongini á øllum eru hjá okkum, sum hjá øðrum, evnað sum ross ella drekar. Sjáldsamar eru rættiligar myndir, men koma tær fyri bæði á manglifjalum og á kistlalokum. Ein kistil á Fornminnissavninum frá 1695 hevur rúnainnskrift.

## Horn

Til smásmíð sítt høvdu teir, umframt viðin serliga horn. Úr tí gjørdu teir serstakliga súpingarbúnýti, sum hvør skuldi eiga sítt av; spønir við stuttum uppbendum skafti, og rundum ella árundum blaði, og skeiðir við longri skafti og vanliga spískari blaði. Besta evnið var neytahorn, tey vórðu sagað áleiðis og annaðhvørt kókað ella bloytt í løgi, síðan løgd í spónalag, ið var læst við eini hornheld. Á henda hátt fekk spónurin tað skap, hann skuldi, men mátti nú verða telgdur og skavaður við serligum knívum og so snákaður og blankaður á ymsan hátt, til hann varð skínandi og mjúkur. Hesir spønir eru summir útskornir og stundum valaverk.

Úr horni gjørdu teir eisini kambar, serliga tættkambar, lúsakambar; hornið varð sett í kambalag og har evnað við smáum sagum og knívum.

Í Sverris søgu frá seinast í 1100-árinum verður sagt frá, at fosturfaðir Sverra kong í Noregi kallaðist Unas kambasmiður. Hann var ættaður úr Føroyum.

Serliga stór horn vórðu gjørd til brennivínshorn, snúshorn og krúthorn, og av stiklunum vórðu gjørdir svøvlar.

## Stoypiformar

Stoypingaformar gjørdu teir úr royðugróti ella fitisteinspettum, sum við hvørt skilliga siga frá, at tey eru ílatabrot, ið gjørd eru til formar. Hvussu teir hava fingið tey, er ikki gott at siga nú, men óhugsandi er ikki, at menn hava funnið tey í gomlum toftum. Teir stoyttu mest tin: skeiðir, spenni, buksu-, troyggju- og stimaknappar og annað.

Úr blýggj stoyttu teir kúlur og pilkar. Summir hava roynt seg í fínari metalsmíði, til skjals eru silvurskeiðir og fittir silvurbollar, sum føroyskir silvursmiðir skulu hava smíðað, umframt eru skrá- og tubbaksdósir, úr kopari og messing,

… framhald á síðu 26


Nýtt Kall 200
Nú eisini við 200 ókeypis sms-boðum um mánaðin
Frá 1. desember hava vit gjørt fartelefonhald okkara, Kall 200, enn betri og bíligari. Umframt teir 200 ókeypis minuttirnar hvønn mánaða at nýta innanlanda, bjóða vit tær nú eisini 200 ókeypis sms-boð um mánaðin. Virði á teimum 200 sms-boðunum er 160 krónur, um tú rindar vanligan sms-takst*. Mánaðargjaldið fyri Kall 200 er 134,40 krónur. Minuttprísurin aftaná teir fyrstu 200 minuttirnar er einans 96 oyru** fyri samrøður í Føroyum. Um tú vilt hoyra meira um nýggja Kall 200 fartelefonhaldið við teimum 200 ókeypis minuttunum og teimum 200 ókeypis sms-boðum at nýta hvønn mánað, kanst tú ringja 20 20 20 og spyrja eftir einum av virkisrøktarum okkara.
Legg til merkis, at um tú hevur Kall 200 fartelefonhald frá okkum, koma tey 200 ókeypis sms-boðini av sær sjálvum á hald títt.
* Virkiskundar okkara fáa tó vanliga antin 10 ella 20% í avsláttri av listaprísinum, alt eftir, hvussu stór samlaða mánaðarnýtslan hjá virkinum er.
** Prísurin er við 10% avsláttri. Um tú hinvegin fær 20% avsláttur er minutt-taksturin aftaná fyrstu 200 minuttirnar einans 73 oyru.
Allir prísirnir eru uttan meirvirðisgjald
Kall • Óðinshædd 2 • 100 Tórshavn • Tel 20 20 20
www.kall.fo
kall
20 20 20
TEAM85

… framhald frá síðu 24

summar við loynilásum. Sumt av hesum sigst at vera evnað her á landi, um so er, óivað eftir fremmandum fyrimyndum. Pípustokkar tykjast hava verið rættiliga vanligir, fleiri eru væl gjørdir úr serliga góðum viði og hava metalhólkar. Ein tílíkur er um somu tíð stavur, pípugoymslan er í handtakinum.

## Sparsemi kann vera dygd

Føroyingar hava altíð lagt dent á at vera væl og hampiliga skøddir og klæddir, eins og teimum tókti væl at vera siðaðir í allari medferð, – og menn vórðu virdir eftir tí. At spara vóru teir noyddir, men sparsemi, sum í roynd og veru er røkiskapur og sketni, er dygd hjá einum fólki.

At smíða øll ella flest øll amboð sjálvur, soleiðis sum gjørt varð, hevur verið slíkt knoss, at vit nú á døgum illa duga at fata tað.

Tað var vanligt, at maður sjálvur laðaði og smíðaði hús síni, sethús og mongu úthúsini. Onkur hevur helst havt royndan smið sum ráðgeva, ella at smiður stóð fyri arbeiðinum, hóast eigarmaðurin sjálvur gjørdi meginpartin av arbeiðinum.

At enda kunnu vit nevna eina stutta frásøgn hjá Mariu Skylv Hansen, sum hon hevur frá mikinesmanni: „At verða biðin um at smíða hús, tað hildu vit vera fragd. Ein og tjúgu ára gamal tók eg sjálvur triði fyrstu húsini uppá meg at gera, bæði laða grundina og smíða tey, tað var í 1887, og væl bar í lag, tó eg ikki hevði smíðað fyrr, men altíð havi eg lagt mær eina við at hyggja væl eftir, hvussu hinir smíðaðu".



*Kristusmynd á Føroya Fornminnissavni.*

*… framhald frá síðu 3*

## Tilkallivakt hjá handverkarum

Handverkari, sum hevur tilkallivakt, verður frá mánadegi til og við fríggjadag kl. 24.00 løntur við vaktargjaldi á kr. 15,00 eyka um tíman.

Eftir fríggjadag til vanliga arbeiðstíð mánamorgun verður handverkari løntur við vaktargjaldi á kr. 30,00 eyka um tíman. Fyri tilkallivakt halgidagar og fastar frídagar verður vaktargjaldið eins og í vikuskiftinum.

## Arbeiðs- / verndarklæðir

Víst verður til § 28, stk. 1, 2 og 3 í sáttmálanum.

*stk. 1* Bakarar fáa frí arbeiðsklæðir.

*stk. 2* Sveisarar, maskinsmiðir og aðrir, ið hava við sveisi-, skeri-, og slípiarbeiði at gera, fáa ókeypis verndarklæðir so sum svintu, ermar, handskar o.a. frá meistaranum.

stk.3 Tá ið sveisað verður inni í tanga, skal útsúgving vera.

Trygdarskógvar eru at skilja sum verndarklæðir, tá Arbeiðseftirlitið setur fram krav til tess vegna trygdina.

## Fastlønarsáttmálin

Fastlønarsáttmálin er broyttur, so at ein yvirtími, út yvir 40 tíma viku, sum verður avspákaður, skal avspákast í mun til virði á honum.

Handverkarar settir eftir fastlønarsáttmálanum fáa eina løn, sum minst er galdandi sveinaløn í høvuðssáttmálanum falda við mánatímatalinum á 173,33 tímar. Tað er annars upp til partarnar at finna eina hóskandi løn.

Fyri starvsfólk sett innan 1. oktober 2007 er galdandi, at gjørdar avtalur millum handverkara og meistara ikki mugu gerast verri orsakað av hesari avtalu. Broytingar í slíkum avtalum skulu tí varslast við uppsagnarfreist.

## Starvsaldur

Eftir 3 ára starvstíð verður viðbót á 1,6% av grundlønini goldin afturat tímalønini.

(115,94 +1,6% (1,86) = 117,80)

Starvstíð er at skilja sum tíð í starvi hjá føroyskum arbeiðsgevara, og innan tað yrkið sum viðkomandi hevur tikið sveinaprógv í.

Sveinar hava rætt til at flyta starvstíð frá einum arbeiðsgevara til annan, um teir ikki hava verið burtur frá arbeiðsøki sínum longur enn 7 ár.

## Viðbøtur

Fyri arbeiði við nýgerð av tunli, arbeiði í dampketli, arbeiði í brúktum olju-, lýsi og øðrum tangum og annars inni í smáum tangum, og fyri arbeiðir í skittfiska- og sildalastum verður goldið kr. 10,00 eyka um tíman.

Smáir tangar eru tangar, ið eru minni enn manshædd allar vegir. Um serliga trong øki eru í tangum, verður tað annars til partarnar á hvørjum virki sær at semjast um.

## Ferðing og koyring fyri arbeiðsplássið

Nýtir handverkarin egnan bil í arbeiðsørindum, fær hann samsýning fyri hvønn koyrdan kilometur, eftir teimum til eina og hvørja tíð galdandi reglum hjá tí almenna.

Meistarin kann soleiðis ikki áleggja handverkaranum at nýta egnan bil í samband við arbeiði.

*… framhald á síðu 30*

# Hvat gert tú við tínar pengar

Kundi tú hugsað tær at vita, hvørjar møguleikar tú hevur?
Kom inn til okkara og fá eitt prát. Í felag finna vit útav, hvørjar íløgur hóska tær best. Tað er einfaldari, enn tú trýrt.




ALT INNAN VENTILATIÓN, HITA OG SANITET
TLF: 31 20 00
Maria Poulsen p/f
www.mariapoulsen.fo


El-amboð
til handverkaran?
Balslev
sjálvandi!
Paslode
makita
metabo
ELEKTRA BECKUM
Tel 31 11 22
www.balslev.fo

*… framhald frá síðu 27*

Ferðing uttanlands verður samsýnt sambært teimum almennu reglunum, um eingin onnur avtala er gjørd.

Fyri starvsfólk sett innan 1. oktober 2007 er galdandi, at gjørdar avtalur millum handverkara og meistara ikki mugu gerast verri orsakað av hesari avtalu. Broytingar í slíkum avtalum skulu tí varslast við uppsagnarfreist.

## Útiarbeiði

Arbeiði, sum verður gjørt aðrastaðni enn á tí arbeiðsplássi, har viðkomandi er starvssettur sambært setanarskrivinum, og handverkarin kann koma fram og aftur sama dag.

Arbeiðsgevarin kompenserar fyri meirkoyring, í mun til fasta arbeiðsstaðið, um handverkarin skal verða á útiarbeiðsplássinum, tá arbeiðstíðin byrjar.

Ferðingin til útiarbeiðsplássið í vanligari arbeiðstíð er partur av arbeiðstíðini.

Fyri ferðaútreiðslur verður soleiðis goldið: Verður almennur flutningur nýttur, verður umframt ferðingartíðina goldið fyri ferðaútreiðslur frá arbeiðsplássinum til útiarbeiðsplássið og aftur. Skipar fyritøkan sjálv fyri flutninginum, verður einans goldið fyri ferðingartíðina. Nýtir handverkari egnan bil til flutningin, verður umframt fyri ferðingartíðina, eisini goldið fyri hvønn koyrdan kilometur eftir reglunum hjá tí almenna. Goldið verður eisini fyri flutning við ferju, møguligt tunnilsgjald vm.

## Kostur

Meistarin hevur ikki skyldu at rinda fyri kost. Undantikið er tó, um handverkarin ikki visti av, at hann skuldi røkja útiarbeiði. Hettar merkir, at handverkarin skal hava boð um útiarbeiði í seinasta lagi dagin fyri. Verður hettar ikki gjørt, hevur meistarin skyldu at rinda fyri kost.

## Burturarbeiði

Burturarbeiði er arbeiði, sum verður gjørt aðrastaðni enn á tí arbeiðsplássi, har viðkomandi er starvssettur sambært setanarskrivinum, og neyðugt er at gista.

Somu ásetingar sum undir útiarbeiði (nevnt omanfyri), tó við hesari broyting:

Meistarin hevur skyldu at rinda fyri vistarhald (kost og logi). Skipar meistarin ikki fyri vistarhaldinum, hevur hann skyldu at gjalda eftir rokning á rímiligum støði, um ikki onnur avtala fyriliggur.

Ferðingartíð frá heimi og til arbeiðspláss og aftur telur sum meginregla ikki við í arbeiðstíðina.

## GONGDIN Í EFTIRLØNINI HJÁ SVEINUM:

| SVEINAR | løntakari | arbeiðsgevari |
|---|---|---|
| 1. oktober 1999 | 1% | 2,0% |
| 1. oktober 2002 | 2% | 2,0% |
| 1. oktober 2003 | 2% | 4,0% |
| 1. oktober 2004 | 2% | 5,5% |
| 1. oktober 2005 | 2% | 6,5% |
| 1. januar 2006 | 2% | 8,0% * |
| 1. oktober 2006 | 2% | 10,0% |
| 1. oktober 2007 | 2% | 11,0% |
| 1. oktober 2008 | 2% | 12,0% |
| 1. oktober 2009 | 2% | 13,0% |

* Halgidagsgrunnur verður til eftirløn

## GONGDIN Í EFTIRLØNINI HJÁ LÆRLINGUM

| LÆRLINGAR | løntakari | arbeiðsgevari |
|---|---|---|
| 1. januar 2006 | 0% | 1,5% * |
| 1. januar 2007 | 0% | 4,5% |
| 1. oktober 2007 | 0% | 5,5% |
| 1. oktober 2008 | 0% | 6,5% |
| 1. oktober 2009 | 0% | 7,5% |

*Um lærlingur fær løn fyri skeivar halgidagar, verður goldið 1,5% minni í eftirløn. Hetta orsaka av at 1,5% var gjaldið, ið áður varð goldið í Halgidagsgrunnin.

## 3-ára sáttmáli við Fíggjarmálaráðið

30. oktober varð semja undirskrivað við Fíggjarmálaráðið. Sáttmálin er endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober í 2007 til 1. oktober í 2010. Semjan byggir á ein karm, sum er umleið 9%.

**Eftirlønargjøldini í sáttmálanum við Fíggjarmálaráðið:**
1. okt. í 2007 hækkar eftirlønargjaldið úr 11% upp í 12,5%
1. okt. í 2008 hækkar eftirlønargjaldið úr 12,5% upp í 14%
1. okt. í 2009 hækkar eftirlønargjaldið úr 14% upp í 15%

**Lønin hækkar:**
1. oktober í 2007 hækkar lønin 2,0%
1. oktober í 2008 hækkar lønin 1,9%
1. oktober í 2009 hækkar lønin 1,9%

Sáttmálar og lønartalvur kunnu heintast í PDF á: www.handverk.fo

Bilasølan
við Øssur Johannesen

www.reyniservice.fo




## Avensis – ein spennandi bilur

Hóast flottir bilar eru ein sonn fragd fyri eygað, mugu teir roynast fyri at fáa tað veruligu upplivingina.

Vit bjóða tær til ein royndartúr við nýggja dagførda Toyota Avensis við betri undirvogni og fjaðraskipan og harvið munandi betri koyrieginleikum.

Við blunkljósum í síðuspeglunum og nýggjum kølaragittari, kúfangarum og lyktum, umframt designbroytingum í kabinuni, er nýggi Avensis ein uppliving í serklassa. Prísur úr 272.600,-

**Vælkomin til ein royndartúr!**

Íroknað prísin er lakkforsegling, metallakk, skráseting, spruttlappar og mottur

**REYNI SERVICE** P/F

Vegurin Langi 188 Hoyvík tlf. 35 30 40
Klingrugarður 700 Klaksvík tlf. 47 30 40

TOYOTA